# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

# Tveir føroyingar til Oyggjaleikirnar

**Næstsíðstu vikuskiftið kláraðu tveir føroyskir svimjarar kravtíðirnar til Oyggjaleikirnir á teininum 50 metur frí. Annar teirra setti eisini bestu tíðina í danska kongaríkinum í sínum árgangi**

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Næstseinasta vikuskiftið var stór føstulávints-svimjikapping í svimjihøllini í Klaksvík. Feløg úr øllum landinum vóru komin saman at taka lut í hesi kapping, sum byrjaði leygarmorgunin 24. februar og endaði sunnukvøldið 25. februar.

Sum skilst, so eydnaðist kappingin væl, og onkur av svimjarunum kláraði eisini kravtíðina til Oyggjaleikirnar í kappingini í Klaksvík.



*Pauli Øssurson Mohr (vinstrumegin) setti nýtt føroyskt met á 50 metra frí teininum, tá kapping var í Klaksvík. Við fram úr tíðini er hann klárur til Oyggjaleikirnar. Eisini Kristian Olsen er klárur til Oyggjaleikirnar á sama teini.*

### Fuglfirðingur sló gamalt met

Tað sermerkta við hesi svimjistevnuni var, at eitt gamalt met hjá Kristoffi Hentze í 50 metra frísvimjing bleiv sligið. Fyri góðum átta árum síðani, í 1998, setti Kristoffur nýtt met á hesum teininum við tíðini 24,86 sekund. Hetta met bleiv sett til NJM-kappingina í 1998, men nú hevur ein ungur fuglfirðingur sett nýtt føroyskt met í 50 metra frísvimjing.

Talan er um 15 ára gamla Paula Øssurson Mohr, sum kom á mál í tíðini 24,35 sekund, og harvið skar hann meir enn eitt hálvt sekund av gamla metinum hjá Kristoffi Hentze. Við fram úr góðu tíðini hevur Pauli eisini klára kravtíðini til Oyggjaleikirnar, har hann nú skal royna seg á fyrsta sinni.

Pauli var tó ikki tann einasta, sum kláraði kravtíðirnar til Oyggjaleikirnar á føstulávintsstevnuni í Klaksvík. Kristian Olsen úr Ægir svam seg nevniliga eisini til Oyggjaleikirnar á sama teini sum Pauli, nevniliga 50 metra frí teininum.

### Pauli bestur í kongaríkinum

Pauli Øssurson Mohr hevur í fleiri ár víst, at hann er ein evnaríkur svimjari, men við nýggja føroyska metinum í 50 metra frísvimjing hevur hann svomið seg fram ímillum tey bestu í danska kongaríkinum. Tíðin hjá Paula er nevniliga so góð, at hann hevur lagt seg á fyrsta plássið í danska kongaríkinum í sínum árgangi á hesum teini.

Hetta er helst enn eitt tekin um, at føroysk svimjing er væl fyri í løtuni, og nú kunnu vit bara bíða spent at síggja, hvussu fer at hilnast hjá Paula og Kristian niðri á Rhodos, har Oyggjaleikirnir vera seinni í ár.

## Neistin vitjar hjá StÍF

Seinastu dystirnir í endaspælinum í Sunset kappingini vera á skránni mikukvøldið, og her tekur STÍF ímóti Neistanum í einum av dystinum. Hvørki av hesum báðum liðunum hevur nakað at spæla um, tí tey hava nevniliga bæði tryggjað sær luttøku í hálvfinalunum. Hetta verður tó seinasti møguleikin hjá báðum liðunum at fáa ein góðan dyst undan hálvfinalunum, og tí er eisini ein møguleiki fyri, at liðini fara at royna okkurt í hesum dystinum. Eingin ivi skal tó vera um, at Neistin er stórfavorittur at vinna dystin. Tær hava nevniliga vunnið allar dystirnar ímóti StÍF í ár.

## Síðsti dystur hjá Kyndli

Kyndil er einasta liðið í besta kvinnudeildini í hondbólti, sum ikki hevur leikt seg í hálvfinalurnar. Kyndil liggur aftast í kappingini, og mikudagin skulu tær so spæla sín seinasta dyst á hesum sinni. Mótstøðuliðið er oddaliðið úr Stjørnuni, sum longu hevur leikt seg í hálvfinalurnar. Kyndil fer helst at leggja nógv fyri í teirra royndum at fáa ein góðan enda uppá kappingini, so kanska tær hava ein møguleika at steðga oddaliðnum mikukvøldið.

# Gunnar vann Hoydalskappingina

**Gunnar Dahl Olsen var fyrsti maðurin um málstrikuna, tá Hoydalskappingin í duathlon var á skránni um vikuskiftið**

DUATHLON
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hoydalskappingin í Duathlon var á skránni um vikuskiftið, og her skuldu íðkararnir út á ein 16 km langan súkklutúr, áðrenn teir skuldu renna átta km.

Skjótt var greitt, at kappingin fór at standa millum Gunnar Dahl Olsen og Eli Christiansen. Hesir báðir løgdu seg nevniliga á odda tíðliga í kappingini, men sum frá leið fór Gunnar frá Eli. Gunnar var eisini fyrstur á mál á súkkluni, og so var tað rennitúrurin, sum lá fyri framman.

Eisini her vísti Gunnar Dahl Olsen seg at vera sterkast. Hann økti um munin niður til Eli Christiansen á øðrum plássi, og aftanfyri byrjaði Andrass Joensen nú at nærkast. Kappingin um fremsta plássið var í roynd og veru avgjørd, so størsti spenningurin var nú, um Andrass fór at fanga Eli aftur, ella um Eli fór at halda sítt annað pláss.

Í tveimum umførum megnaði Andrass eisini at fara fram við Eli á rennitúrinum, men at enda vísti Eli seg at vera tann sterkasti, og hann endaði eisini á øðrum plássi 14 sekund frammanfyri Andrass.

Sostatt gjørdist Gunnar Dahl Olsen vinnari av kappingini, Eli Christiansen endaði á øðrum plássi, meðan Andrass Joensen bleiv nummar trý.

Súsanna Skylv Sørensen var eisini við í kappingini, men hon hevði onga súkklu, og tí hevði hon valt bert at renna. Hon fór avstað á rennitúrin saman við Gunnari, og hevði hon næstskjótastu tíðina á renniteininum, har Andrass Joensen var sterkastur.